# Vindeygu fyri lívið

**Nýtt útsýni, flyta teltpelar, burtur í bygd – ja, ikki er gott at vita. Men Djóni Ziska, sum í mong ár ikki hevur gjørt annað enn vindeygu og rútar í Føroyum, arbeiðir nú hjá eini tí mest navnframu vindeygaverksmiðjuni í Danmark, sum eitur Velfac**

FØROYINGUR UTTANLANDS

*Orð & Myndir: Dávur Winther*

Á ferð í Danmark legði eg leiðina um Horsens, lestrarbý mínum í síni tíð. Har var nógv kent fólk at hitta. Men serliga áhugavert er at síggja, hvussu munandi býurin er broyttur – og ikki minst tær mongu stóru og vøkru lýsingarnar um alskyns konsertir og tiltøk, sum eru í mentanarbýi Danmarkar burturav: Horsens.

Á nýggjum ídnaðarsøki norðan fyri Horsens liggja varkir virkisbygningar. Á tí eina stendur Velfac – Vinduer for livet. Hugurin hevur onkuntíð reikað um at gera eina glasstovu, vegna tað, at summarið ikki rættiliga fæst uttandura í Føroyum. So hví ikki royna tað inni. Tí helt eg, at rættast var at banka uppá hjá Velfac.

Velfac er kent merki og lýkur sera kravmiklar royndir, sum einans verða gjørdar í Onglandi við røttum jetmotorum. Har verða vindeyguni sett í so sonn veðurviðurskifti, sum gjørligt - og kanska verri enn tað.

Eg bankaði uppá og segði míni ørindi. Tá ið tey skiltu, at eg kom frá Føroyum, var daman skjót at svara mær: »Jamen vi har en færing her i huset, der hedder Djóni Ziska«!

Løtu seinni sótu vit báðir Djóni í hugnaligum práti um, hvussu vindeygum kunnu gerast lívsverk, og annars um, hvussu tú skrúvar teg fram til rættu loysnina.

Djóni hevur saðlað av nýggjum, flutt hús og heim til Danmarkar. Hann byggir í Ry, norðan fyri Horsens. Konan farin á skúlabonk, og Djóni hevur fingið gott arbeiði sum sølumaður hjá Velfac.

Djóni Ziska er friðarligur av lyndi, men veit hvat hann tosar um. Hann hevur ára langar royndir innan yrkið úr Føroyum at vísa.

Tá ið eg spurdi hvussu gekk, kom eitt lítið bros fram: »Eg haldi, tað gongur bara væl. Eg havi júst í hesi løtu vunnið míni deild í felagnum størstu einstøku umbønina av vindeygum í mong ár«!

Tað gongur við rúkandi ferð í byggivinuni í Danmark. Av somu orsøk eru kostnaðirnir høgir bæði á tilfari og smiðunum. Og freistin at lata vørurnar er alin long.

Tað tykist sum Djóni Ziska hevur tikið orðini hjá Velfac til sín: »Vindeygu fyri lívið«. Men hann trívist í nýggja arbeiðinum.

- Og nýtt útsýni er altíð gott, sigur tann fyrikomandi og siðiligi Djóni Ziska, sum ætlar sær at vera í Danmark eina tíð.



- Orsøkin til at eg søkti akkurát til VELFAC er, at fyritøkan er ein innioatív. Og tá eg rokni við at framtídar vindeyguni koma at broytast nógv tey komandi árini, vil eg fegin vera við í fremstu rød. Mín styrki er so glas parturin av sjálvum vindeyganum, sigur Djóni Ziska



*Tað tykist sum Djóni Ziska hevur tikið orðini hjá Velfac til sín: »Vindeygu fyri lívið« Men hann trívist í nýggja arbeiðinum.*
*- Og nýtt útsýni er altíð gott, sigur tann fyrikomandi og siðiligi Djóni Ziska, sum ætlar sær at vera í Danmark eina tíð*

**FAKTA**

VELFAC 13.000 starvsfólk
Umsetning 1,2 mia (2005)
Hevur virki í 40 londum

# Nýggj lóg um arbeiðsskaða

ARBEIÐSSKAÐAR

Uppskot til løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða, ið landsstýrismaðurin í vinnumálum ætlar at leggja fyri Løgtingið í heyst, er nú send feløgum, myndugleikum og stovnum til hoyringar.

Vinnumálaráðið skrivar á heimasíðuni, at lógaruppskotið byggir á somu meginreglur sum vanlukkutryggingarlógin, tó so, at munandi broytingar eru gjørdar, m. a. at hugtakið arbeiðsskaðar verður víðkað, og at heimilaðu veitingarnar verða víðkaðar. Broytingarnar hava við sær, at fleiri arbeiðsskaðar verða fevndir av lógini, og at endurgjaldið fyri arbeiðsskaðar verður hægri.

Ætlanin er, at nýggja lógin skal koma í gildi 1. januar 2007, og fer hon tá at avloysa galdandi lóg á økinum, vanlukkutryggingarlógina, sum lítið og einki er broytt síðani hon kom í gildi í 1966.

Hoyringsfreistin er sett til 18. september 2006.

SUNSET Boulevard

Starvsfólk
TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

**Fullatíð**
Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 17 ár og eldri til at arbeiða fullatíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og liggja millum kl. 08.00 og 21.00. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir.
Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:**
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.